Tveir knæskaddir í GÍ

Gøtumenn ásannaðu, at hesa ferð vóru tað mótstøðumenninir, ið høvdu havt eyka viljan, ið skal til, um tað skal eydnast at vinna

GÍ-KÍ
Jóannes Hansen

Uppgerðin hjá gøtumonnum ímóti KÍ kann fara at vísa seg at vera ein dýr søga. Eitt var, at liðformaðurin, Poul Ennigarð, sá gult og tískil verður leikbannaður næsta sunnudag á Eiði. Harafturat noyddust bæði Áslakur R. Petersen og Krzystof Popczynski av vøllinum, tí teir høvdu fingið løst í knæið. Hvussu meinur løstirnir vóru, dugdu teir í Gøtu ikki at siga í gjár, men teir ivast í, um Popczynski verður førur fyri at spæla sunnudagin.

Eftir níggju stig í trimum royndum eftir summarsteðgin steðgaði KÍ tykkum. Hvussu bar tað til, spyrja vit Paula Jarnskor, sum er hjálparvenjari:

– Tað sást væl, at klaksvíkingarnir høvdu eyka viljan, sum skal til fyri at vinna. Teir vóru oftari fyrr á bóltinum, enn okkara vóru, og teir høvdu yvirtakið á miðvøllinum.

Kviga tit fyri, at gongdin nú fer at verða, sum hon var undan summarsteðginum, tá ið tit eftir fyrsta stigamissin høvdu ilt við at fáa úrtøku?

– Avgjørt ikki. Tapið smakkaði illa í umklæðingarrúminum eftir dystarlok. Spælararnir eru ógvuliga væl fyri, og teir fara at reisa seg. Miðalaldurin er 22 ár, og tað man vera eitt tað lægsta. Liðið styrknar støugt, og hesa ferð var tað serliga hugaligt at síggja miðverjan Kaj Ennigarð, sum er yngsti maður á liðnum, og sum hesa ferð kanska var besti maðurin hjá okkum. GÍ fer heilt víst at vera við til at seta dagsskránna restina av hesum kappingarárinum, og vit eiga góða framtíð, metir Pauli Jarnskor.

GÍ-KÍ 1-2 (0-1):

Klaksvíkingar vóru ikki at kenna aftur

Hamskifta KÍ spældi seg til fleiri upplagdar møguleikar og megnaðu at halda heimamonnunum í Sarpigerði næstan heilt burtur frá málinum hjá Jákupi Mikkelsen, sum bjargaði brotssparkinum hjá Popczynski

FÓTBÓLTUR
Jóannes Hansen

Tað eydnaðist millum annað hjá KÍ at skerja GÍ-spælið við sera tættari markering av Súna Olsen, sum soleiðis ikki slapp at hava vanliga týðandi leiklutin
Mynd: Álvur Haraldsen

Tað var gott lag á klaksvíkingunum í Gøtu sunnudagin. Eftir vánalig avrik í bíðirøð, megnaðu teir at venda gongdini ímóti GÍ, sum síðani summarsteðgin hvørja ferð hevði fingið fult. KÍ fór um fjørðin við 2-1 sigri. Hann var fult uppiborin. KÍ avrikið var ikki at kenna aftur. Hetta vóru tað fleiri orsøkir til.

Ein var tann, at GÍ ikki kendi sína vitjunartíð, tá ið teir tíggju minuttir eftir steðgin fingu gyltasta møguleikan, sum tað ber til at fáa í fótbólti. Brotssparkið, sum varð dømt fyri samanbrest mann ímóti manni úti í horninum í brotsteiginum, mettu gestirnir at ikki at vera serliga sannførandi. Men tað var einki at gera við. Einastu ráðini vóru, at Jákup Mikkelsen, sum var komin fyri seg eftir vøddaskaðin og var sera tryggur aftasti skansi, skuldi bjarga royndini úr ellivu metrum, og tað gjørdi hann. Skotið hjá Popczynski var ikki so ógvuliga sannførandi. Jákup tveitti seg rætta vegin, og hann bjargaði.

Ein onnur orsøk var, at KÍ hesa ferð tóktist hava funnið røttu ódnirnar til røttu menninar. Veteananir Jan Andreasen og Harley Bertholdsen, sum venjarin ikki hevur havt í kjarnuni í ár, vóru settir í plássini, sum teir hava spælt nógv seinastu trettan árini. Jan var saman við Niclas Niclasen tryggur í miðverjuni, og Harley syrgdi fyri, at tað var skil í á vinstra vongverjanum.

Umskipingarnar í verjuni høvdu við sær, at tað bar til at flyta Ova Nysted í álopið. Har hevur lítil ella eingin tyngd verið í higartil. Ovi hevur onkuntíð í vónleysum støðum fram ímóti dystarenda verið fluttur fram, uttan at tað hevur givið nakað, tí tað hevur verið óskipað. Hesa ferð var hann frá fyrsta bríksli undir liðini á Jacob Bymar, og tað bar álopstyngd við sær. Ovi megnaði at temja ella snitta so at siga allar framleggingarnar, og Jacob Bymar, sum var skjótari, enn mótstøðumenninir vóru tað, bardist sum ein úlvur, inntil hann miðskeiðis í 2. hálvleiki smáskaddur bað um at verða tikin út.

At teir fremstu hjá KÍ megnaðu at leggja trýst á verjuna hjá GÍ, hevði við sær, at alt KÍ liðið fekk størri pláss og harvið meiri tíð til sítt spæl. Týdningarmiklast av øllum var tað, at hugburðurin hjá KÍ hesa ferð var púra rættur og harvið heilt øðrvísi, enn hann leingi hevur verið. Á sentrala miðvøllinum vóru Jan Joensen og Atli Danielsen greitt yvir Súna Olsen og Símun Louis Jacobsen. Eyðun Klakstein, sum hevur verið ein tann stinnasti klaksvíkingurin í óeydnisárinum, var sera væl upplagdur á miðvøllinum í vinstru, inntil hann aftaníframá var fullkomuliga órímuliga sparkaður niður og noyddist at taka seg aftur.

Arnhold Joensen spældi væl í 2. hálvleiki, tá ið hann bæði vann taklingar og í luftspælinum, og KÍ spældi seg til fimm upplagdar málmøguleikar, meðan GÍ burtursæð frá brotssparkinum og málinum, sum teir fingu í yvirtíðini, bara hevði eina orduliga royndá KÍ málið.

Hjá GÍ tóktist tað darvið Popczynski nógv, at hann hevði misnýtt gylta møguleikan at javna, og hann tók seg aftur, tá ið tað ráddi mest um at leggja tyngd í álopspartin. Adam hevur góð evni at spæla, men hann vísti ikki styrkina, sum skal til, um fremsti maðurin skal gerast vandamikil. Súni Olsen, sum í leysum spæli ikki slapp at hava eyðsýnda og eyðkenda leiklutin, sendi fleiri høg og neyv hornaspørk í brotsteigin, men hóast onkrir verjuspælarar hava røttu hæddina, so hava teir ikki tað pondus í luftini, sum GÍ plagdi at hava.

Mál og møguleikar

Ovi Nysted var støðug hóttan ímóti GÍ málinum. Tá ið tíggju minuttir vóru farnir lyfti hann úr leysari støðu upp um Hall Hansen, men bólturin fór skeivu megin stólpan, og átta minuttir seinni sendi Ovi framvið málverjanum, men skeivu megin stólpan, eftir at Jacob Bymar hevði sneitt fleiri av og lagt innfyri.

Fimm minuttir undan hvíldini eydnaðist tað hjá Ova Nysted. Eyðun Klakstein krúllaði framvið fleiri úr vinstru, stakk fram til Ova, ið vendi eitt sindur skeivt, tá ið hann tamdi hegnisliga, legði seg afturat og smekkaði við vinstra beini úr eitt sindur høgru og umvegis handara stólpan og í málið.

Hóast leiðslumálið so tóktist tað sum um, at mál til mótstøðumenninar kundi koppa higartil illa skølsettu klaksvíkingunum, men tá ið tíggju minuttir vóru eftir, tryggjaði innskifti Erling Fles KÍ sigurin. Frá miðstrikuni sneiddi hann fýra spælarar av, áðrenn hann setti framvið Halli Hansen, og lítla løtu seinni, tá ið GÍ hevði spent álopsbogan nógv, fekk hann sama møguleikan, men bólturin fór skeivu megin stólpan.

Í yvirtíðini vísti Súni Olsen sítt format, tá ið hann í høgru sneiddi fleiri av sær og av baklinjuni legði til handara stólpan, har Adam setti innaru síðuna á. Men tá var ov seint hjá GÍ at koma aftur í aftur, og harvið var fyrsta tapið hjá teimum síðani summarsteðgin veruleiki.

FAKTA UM DYSTIN

GÍ-KÍ 1-2 (0-1)
0-1: Ovi Nysted 40.
0-2: Erling Fles 81.
1-2: Adam Pauluszek 90.
Dómari: Birgir Sondum
GÍ: Hallur Hansen — Poul Ennigarð, Kaj Ennigarð, Atli Gregersen, Poul Henning Jacobsen — Áslakur R. Petersen (Jónreid Dalheim, 27.), Súni Olsen, Símun Louis Jacobsen, Hans Pauli Petersen — Krzystof Popczynski (Poul Arni Jacobsen, 78.), Adam Pauluszek
Gult kort: Poul Ennigarð
KÍ: Jákup Mikkelsen — Leon Bjartalíð, Jan Andreasen, Niclas Niclasen, Harley Bertholdsen — Arnhold Joensen, Jan Joensen, Atli Danielsen, Eyðun Klakstein (Símun Joensen, 53.) — Jacob Bymar, Ovi Nysted

Skála-B68 2-1 (2-0):

Enn eitt troystarsleyst tap

Toftamenn tykjast stevna beina lið í næstbestu deildina. Sunnudagin gjørdist talan aftur um tap. Hesaferð fyri Skála, sum hinvegin heldur fast um silvurplássið

FÓTBÓLTUR
Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

Hóast Skála ikki fekk stilla við sterkastu manning, so var tað nóg mikið til at basa toftamonnunum, sum enn hava fimm stig upp til bjargingina
Mynd: Álvur Haraldsen

Tað er ikki frítt, at ein deymur av Europa er komin yvir Skála í ár. Fyrr hava eureisku ævintýrini einamest snúð seg um teir hondbóltsdystir, sum fyrst VÍF og síðani StÍF hava leikt í europeiskum høpi í høllini á Skála, ella hevur tað verið okkurt útlendskt skip, sum hevur verið til umvælingar á Skipasmiðjuni.

Fótbólturin er í øllum førum ikki settur í europeiskt høpi fyrr, men tað er nú alsamt meira, sum talar fyri, at hetta verður veruleiki næsta summar.

Bílig Skála-mál

Sunnudagin var B68 á vitjan, og tó at toftamenn eru avgjørda botnliðið í deildini, so var tað ikki heilt frítt, at Skála-menn bóru ótta fyri dystinum sunnudagin. Ikki minst tí liðnum restaði fýra av teimum leikarum, sum vanliga plaga at vera fastir millum teir fyrstu ellivu.

Tað eydnaðist tó hjá Skála at basa mótstøðuni, og ikki minst, so bóru málini boð um eina typiska botntilveru. Fyrru ferðina var talan um afturlegging til málverjan, har Jónhard Frederiksberg smoygdi sær ímillum, og í øðrum lagi var talan um hálvkiksað útspæl frá málverjanum, sum Nenad Stankovic – við einum framúr sparki - kundi gera sær dælt av. Hann smekkaði til at miðjum vølli, og so kundi Meinhardt Joensen, sum er nýggjur í Tofta-málinum bara hyggja, meðan bólturin sveimaði í meskarnar.

Eftir steðgin royndi B68 at bera í bøtuflaka fyri mistøkini í fyrra hálvleiki, men hóast teir royndu at trýsta, so var so sum so við møguleiknum, og málið frá Anderson mundi kennast sum ein fátøk troyst í niðurflytingarstríðnum.

Her er B68 framvegis á niðasta plássinum við fimm stigum upp til ÍF. Fimm dystir eru eftir at spæla, og í tí triðja seinasta av hesum skal B68 á heimavølli taka ímóti fuglfirðingunum. Ein dystur sum longu nú tykist vera tann, sum fer at gera av, hvat av liðunum noyðist at spæla leygardag komandi kappingarár.

Fakta um dystin

Skála-B68 1-2 (0-2)
0-1: Jónhard Frederiksberg
0-2: Nenad Stankovic
1-2: Anderson

Skála: Igor Bjarni Kostic – Rói Jacobsen, Rúni Rasmussen, Dusan Jaic, Iulian Florescu – Eugen Stanciu, Sveinur Justinussen, Nenad Stankovic, Alexandur Johansen – Jónhard Frederiksberg, Bogi Gregersen
B68: Meinhardt Joensen – Ronni Svalbard, Bogi Petersen, Kári Sigvardsen, Jákup Eli Olsen, Jóhan Petur Poulsen, Eyðstein Skipanes, Øssur Hansen, Øssur Jacobsen, Stanislav Stankov, Anderson

Útisetastuðlarnir á netinum

KÍ er helst einasta føroyska ítróttarfelagið, sum hevur ein skipaðan fanclub uttan fyri egið øki.

Tað eru sjávlandi KÍ stuðlarnir í Havn, sum talan er um. Stuðulsfelagið hevur nú tvey ár á baki, og nú KÍ verður 100, eru stuðlarnir eisini komnir á alnetið.

Undir slóðini, **www.ki-klaksvik.fo/kistudlar/ki.htm**, ber til at lesa um ymiskt, sum stuðlarnir royna at fyriskipa, og millum annað sæst eisini, hvørja gávu teir ætla at lata felagnu á runda degnum.

-jm

Hetta var heilt øðrvísi

Væl upplagdi tíðindamaðurin á KÍ miðvøllinum roknar við, at hann verður førur fyri at spæla ímóti NSÍ, sum hann heldur KÍ fer at hava møguleika ímóti, um teir varðveita sama fokus, sum teir høvdu í Gøtu

NSÍ-KÍ
Jóannes Hansen

Smáir tíggju minuttir av seinna umfarinum vóru farnir, tá ið Eyðun Klakstein noyddist av vøllinum. Eftir órímuliga takling aftaníframá fekk hann ikki sett fótin til. Í leikliga aldudalinum, sum hevur eyðkent avrikini hjá KÍ, hevur títti og hugflogsríki tíðindamaðurin á KÍ miðvøllinum verið tann mest ágangandi. Sunnudagurin var einki undantak.

- Hesa ferð var stuttligt at spæla. Vit vóru langt niðri mánakvøldið í síðstu viku, eftir at vit sunnudagin høvdu tapt 4-0 á Eiði. Tað var sjálvandi týdningarmikið, at vit nú høvdu fingið tríggjar stuðulsspælarar við aftur, men eg haldi, at vit allir kunnu vera nøgdir við avrikið. Í vikuni tosaðu nógv um støðuna, og lundadøgurðin og peptalkie, sum býráðsformaðurin bjóðaði okkum til á Hotel Norð hóskvøldið, hjálpti heilt víst eisini, heldur Eyðun Klakstein.

Hvussu ber tað til, at gongdin kann broytast so nógv eftir einari viku?

- Hesa ferð spældu vit bólt, meðan vit nógvar aðrar ferðir hava sparkað. Tað eydnaðist betri, enn tað hevur gjørt, at flyta spælið fram á vøllin, ketirnar hingu væl saman, og tað hevði alstóran týdning, at vit so ofta megnaðu at royna í miðri málinum.

Gongur tað nú rætta vegin?

- Vónandi fara vit at megna at varðveita fokus. Um vit gera tað, so fara vit at hava møguleika ímóti NSÍ. Einki kemur av sær sjálvum. Avrikið hesa ferð vísti, at vit framvegis hava evni at spæla og ikki bara at sparka fótbólt, men vit mugu arbeiða og stríðast.

- Hesa ferð var stuttligt at spæla. Vit vóru langt niðri mánakvøldið í síðstu viku
Mynd: Álvur Haraldsen

Verður tú við sunnudagin?

- Eg fekk eitt spark inn á hælsinuna. Eg fekk ikki sett fótin til og noyddist av vøllinum. Men eg rokni við at vera førur fyri at venja týskvøldið. Tað hevur nógv at siga køla leingi og støðugt, og tað varð gjørt, sigur Eyðun Klakstein.

Lítið hugaligt

Øssur Hansen ásannar, at støðan á Toftum er alt annað enn góð í lotuni, men framvegis roynir B68 at arbeiða seg úr trupulleikunum

FÓTBÓLTSPRÁT
Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

Tað er einki at siga til, at fótbóltslagið á Toftum er í botni. Tvey stig í 13 dystum er úrtøkan higartil, og tað hevur við sær, at annars so stinnu toftamenninir eru í ovurstórum vanda fyri at missa sessin í deildini. Nakað sum leikararnir eisini sjálvir ásanna.

- Tað er sum so einki at siga um støðuna. Hana kanst tú lesa á stigatalvuni, sigur veteranurin á liðnum, Øssur Hansen, tá vit fregnast, hvørt leikararnir á liðnum framvegis hava eina vón um, at tað skal bera til at vinna á niðurflytingarspøkilsinum.

- Trúnna hava vit tó framvegis, men nú má ferð koma á hjá okkum. Vit mugu til at vinna nakrar dystir – helst longu næstuferð, tá HB vitjar. Vit kunnu í øllum førum ikki bara ganga og vóna, at ÍF skal halda á fram at tapa, og hartil skulu helst hava munin niður á tvey stig, áðrenn vit tann 19. september eiga heimadyst móti teimum.

Nógvar orsøkir

Sjálvur hevur Øssur verið partur av B68-liðunum í drúgt áramál. Fyrsti dysturin var longu í 1987, og tó at steðgir eisini hava verið í øðrum felogum, so er einki at ivast í, at hann er toftamaður.

Flestu av árunum hevur tað eisini verið so, at B68 hevur togast fram móti oddinum, og tí er støðan kanska eyka trupul, nú mótgongdin av álvara hevur tikið til.

- Tað sigur seg sjálvt. Ikki minst í mun til árið í fjør, tá mest sum alt gekk eftir vild, men tað hevur so eisini sínar orsøkir.

- Vit høvdu nógva frágongd í fjør, og so hava vit avgjørt ikki verið hepnir á nakran hátt, heldur Øssur.

Beint sum árið byrjaði, mistu vit kanska týdningarmesta leikaran í málverja okkara. Tilgongdina, sum vit fingu í Mikkjaldi Thomassen og Herbert í Lon, hava vit kent lítið til vegna skaðar, og eitt nú varð steðgurin hjá Brynjálvi Nielsen ikki so drúgvur, samstundis sum eisini Súni Fríði Barbá fór úr hópinum.

Leiðslan hevur so arbeitt við øðrum møguleikum, men tað er altið trupult, tá leikarar koma mitt í einum ári, og enn hevur tað bara ikki riggað nóg væl, staðfestir Øssur.

Framgongd at hóma

Mitt í allari neyðini, so dugir hann tó kortini at síggja nakrar glottar í avrikunum hjá liðnum.

- Tapini hesar seinastu dystirnar hava í øllum førum ikki verið av sama slag. Vit hava verið betri við í spælinum, men hinvegin hava vit so framt nøkur dýr persónlig mistøk. Megna vit at fáa hesi burtur, so eiga vit at hava møguleikan. Skála hevur jú tvey ár á rað prógva, at tað ber til, so hjá okkum ræður bara um at arbeiða hart, og annars trúgva upp á uppgávuna, sigur altso Øssur Hansen at enda.